# Bill Gaither treff í Atlantis

**Mánakvøldið 16. desembur verður stórt Bill Gaither lovsongs-tiltak í mentunarhúsinum Atlantis í Klaksvík**

LOVSANGUR
*Solby A. Eliasen*

**Klaksvík:**
Tað er Kirkjutorgið, sum skipar fyri hesum treffinum eftir fleiri áheitanum frá fólki. Fólk kenna Bill Gaither kanska serliga frá sjónvarpinum. Sjónvarpið plagdi at senda lovsongsløturnar við Bill og Gloriu Gaither sunnukvøld, men nú eru tær so tiknar av skránni. Síðani hevur Kirkjutorgið móttikið nógvar áheitanir um at skipa fyri einum Bill Gaither treffi.

Hans Eiler Hammer, sóknarprestur, sigur, at hesar løtur eru lovsongsløtur upp á tað besta.

– Millum føroyingar og okkara sjómenn er hetta ein "bestseljari", sigur hann og leggur samstundis afturat, at tey gjørdu av at skipa fyri hesum tiltaki, tí tey hava fingið fleiri fyrispurningar. Hans Eiler sigur eisini, at jólatíðin er ein vøkur tíð, men samstundis ein strævin tíð, har fólk renna og tuska fyri at blíva liðug til jóla.

– Vit vilja tí bjóða fólki til at slappa av og njóta hesar vøkru tónar nú mánakvøldið, sigur hann.

Bill og Gloria Gaither geva út sera vælumtókt gospelløg á video, fløgum og nú eisini á DVD. Tey savna trúgvandi menniskju frá Ameriku og aðra staðir við til at syngja saman.

Tiltakið byrjar klokkan 17, og byrjað verður við at sýna lovsongsløtuna " I´ll fly away". Kl. 19 verður "Billy Graham, volume 1" og at enda klokkan 21 sýna vit "New Orleans Homecoming".

Allar sýningar verða vístar á stórskíggja og kostar tiltakið 20 krónur fyri allar sýningarnar.
Kaffi verður til keyps og eisini hópin av Bill Gaither bondum. Alt tiltakið varar frá klokkan 17 til 23.

*Eftir fleiri áheitanir frá fólki, hevur Kirkjutorgið í Klaksvík gjørt av at skipa fyri einum Bill Gaither treffi í mentunarhúsinum Atlantis mánakvøldið*



# Jólakonsert í Christianskirkjuni

**Árliga jólakonsertin, sum Klaksvíkar Hornorkestur skipar fyri, verður sunnukvøldið klokkan 20.30. Á konsertini luttaka umframt hornorkestrið, eitt gentukór úr Leirvík og kvinnukórið Suð**

JÓLAKONSERT
*Solby A. Eliasen*



*Myndatekstur: Árliga jólakonsertin verður í Christianskirkjuni sunnukvøldið klokkan hálvgum níggju*

**Klaksvík:**
Jólakonsertin í Christianskirkjuni hevur í mong ár verið eitt av teimum vælumtóktu tiltøkunum upp undir jól. Kirkjan plagar at vera fullsett við fólki, sum fáa høvi at hoyra kór og hornorkestur framføra kend jólaløg. Ymiskt hevur verið hvørji kór hava verið við, og í ár verða tvey kór við, sum ikki hava verið áður.
Kvinnukórið Suð úr Klaksvík undir leiðslu av Steinvør Fonn fer at framføra sangir bæði saman við hornorkestrinum og fyri seg sjálvan.

Kórið fer at syngja This little light of mine, sum er ein negro spiritual og so eisini eitt lag úr Gandafloytuni hjá Mozart. Saman við hornorkestrinum fer kórið at framføra Memory og I don´t know how to love him, sum báðir eru úr kendum sangleikum. Eisini fara hornorkestur og kór at framføra When you wish upon a star, Nobody knows, Swing low, sweet cheriot, Panis Angelicus og eitt svenskt lag, sum eitur Fjariln wingad.

Steinvør Fonn sigur, at tær gleða seg til at verða við á konsertini.

– Kirkjan er eitt gott høli at syngja í. Har er so góður akustikkur, sigur hon. Men tað verður neyðugt hjá kórinum at hava mikrofonir til felagsframførsluna.

– Tað noyðast vit, annars hoyrast vit ikki fram um hornorkestrið, sigur Steinvør.

Kvinnukórið Suð og Klaksvíkar Hornorkestur høvdu fyrr í vetur eina konsert saman í skúlanum við Ósánna. Tað var ein avbera góð konsert og felagsframførslurnar riggaðu væl. Og nú fara tey so at royna seg saman í Christianskirkjuni nú sunnukvøldið.

Tað er dirigenturin hjá Klaksvíkar Hornorkestri, danin Ulf Nordlund, sum hevur biðið kvinnukórið Suð syngja saman við hornorkestrinum.

– Tað høvdu vit ikki roynt áður, og er tað tí sera spennandi og nýtt fyri okkum. Tí vildu vit royna tað, sigur Steinvør, sum er sera spent upp á, hvussu jólakonsertin fer at verða.

Gentukórið úr Leirvík fer at framføra tvey løg á konsertini, men tíverri hevur tað ikki eydnast at fáa at vita, hvørji løg talan er um. Hornorkestrið fer so eisini at framføra onkur løg uttan kórsang afturvið millum annað verður ein jólasirpa, sum ein av teimum elstu spælarunum hevur gjørt til hornorkestur. Og sum vanligt verður eisini felagssálmasangur á skránni sunnukvøldið.

Tað er ongin ivi um, at við hesum luttakarunum er lagt upp til eina sera góða jólakonsert við øðrvísi tilfari.

# Televarpið ókeypis til 1. februar

**Televarpið fer nú í kjalarvørrinum av øllum byrjunartrupulleikunum at bjóða sínum kundum eina ókeypis royndartíð inntil 1. februar**

TELEVARPIÐ
*Solby A. Eliasen*

Aksel Haraldsen, dagligur leiðari á Televarpinum sigur, at bæði Televarpið og kundarnir hava rent seg í fleiri byrjunartrupulleikar enn væntað. Og tí hevur Televarpið gjørt av, at bjóða sínum kundum tann fyrsta mánaðan ella so sum eina ókeypis royndartíð.

Aksel sigur, at sendarin hjá teimum í Nólsoy hevur ikki víst seg at virka so væl, og tað letur eisini til, at forstáilsi fyri skipanini hjá teimum millum fólk ikki er so gott, helst tí at tøknin er nýggj og tí uppførir seg øðrvísi. Og so undirmettu tey antennurnar, sum fólk nýttu til at síggja Rás Tórshavn. Hetta seinasta hevur so við sær, at fólk mugu ogna sær eina nýggja antennu fyri at kunna síggja Televarpið.

– Hetta eru alt byrjunatrupulleikar, sum hvørki vit ella kundarnir høvdu væntað fóru at verða so umfatandi, og tí vilja vit vísa ein góðan vilja, sigur dagligi leiðarin fyri Televarpinum, sum í løtuni hevur um 700 haldarar.

Spurdur um hetta ikki er eitt fíggjarligt bakkast fyri Televarpið, svarar Aksel, at soleiðis kann ein síggja upp á tað, men at tey heldur vilja hava 700 glaðar kundar enn nakrar hundrað sera ónøgdar.

Henda royndartíðin gevur so samstundis eisini Televarpinum eitt skoðbrá, har tey kunnu arbeiða við at fáa viðurskiftir í rætt lag, sum ikki eru tað enn. Millum annað er SvF ikki hektað upp á sendaran enn, men tað vónar Aksel verður áðrenn jól. Nær DR 1 og 2 rásirnar verða at síggja, veit Aksel ikki at siga enn.

*Televarpið bjóðar nú kundum sínum eina ókeypis royndartíð til 1. februar*





# Jólatrø í Vágum



*Barnakórið í Sandavági sang, tá jólatræið varð tendrað*
*Mynd: Edvard Joensen*

**Jólatrøini í Sandavági og Bø vórðu tendrað í vikuni. Sørvágs Tónleikarafelag og sangkór luttøku**

JÓLATRØ
*Edvard Joensen*

**Vágar:** Mánakvøldið varð jóaltræið í Sandavági tendrað, og mikukvøldið vóru tað bígjgarfólk, sum savnaðust til hugnaløtu kring jóaltræið í bygdini.

Sandavágsfólk eru væl fyri við kommunalum jólatrøum, hóast tað er stóra jólatræið á Nullinum, sum er høvuðstræið. Umframt stendur eitt á hólminum í ánni uttan fyri kirkjuna, og eitt minni aðrastaðni í bygdini.

Jólatræið í Sandavági varð tendrað mánakvøldið, har David Johannesen, sóknarprestur, helt røðu, og Sórvágs Tónleikarafelag spældi jólaløg. Eisini barnakórið í Meinigheitshúsinum í Sandavági setti sín serliga dám á løtuna við sangi.

Ikki færri enn tveir jólamenn vitjaðu eisini sandavágsfólk hetta kvøldið, og nógv vóru tey, bæði børn og vaksin, sum forvitin vóru at vita, hvat gott teir høvdu í posanum.

Tá barnakórið hevði sungið nakrar sangir, varð farið í SÍF húsið, har Sandavágs Kommuna beyð kaffi og lagkøku, saman við rís alamande. Heilt fitt av fólki var smankomið hetta kvøldið í Sandavági.

Eisini í Bø savnaðust fólk um jólatræið í vikuni.

Mikukvøldið varð jólatræið í Bø tendrað, og eisini har var Sørvágs Tónleikarafelag og lat sína jólatónar ljóða. Og Bíggjarkórið sang.

Jóannis Petersen, deknur í Bíggjar Kirkju, las jólaevangeliið, og eftir samkomuna beyð borgarstjórin øllum til ein drekkamunn og køkur í skúlanum.

Eisini í Bø var væl av fólki komið saman, tá jólatræið varð tendrað. Serliga stuttligt hildu fólk tað vera, at eisini bíggjarfólk, sum búgva aðrastðani, eitt nú í Havn, vóru komin vestur gjøgnum nýupplatna tunnilin hetta kvøldið.



*Mánin ansaði eftir, at tað stemmaði hjá hornorkestrinum, sum pældi fyri jolatrænum i Bø*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

# Sjálvsstýrisflokkurin setir við

**Royndir verða nú gjørdar at fáa lív í aftur Unga Sjálvstýrið. Landsnevnd er vald at standa fyri arbeiðinum**

POLITIKKUR
*Edvard Joensen*

Farið verður nú undir at endurstovna lokalfeløgini hjá Unga Sjálvstýrinum, verður sagt í tíðindaskrivi, nývalda landsnevndin fyri Unga Sjálvstýrið hevur sent um dagarnar.

Fundur varð hildin á Glyvrum sunnudagin, har gjørt varð av at fara undir hetta arbeiðið.

Í fyrsta lagi er ætlanin at stovna feløg, har flokkurin hevur góða undirtøku frammanundan. Tað vil so verða í Eysturoy, Suðurstreymoy og Norðoyggjum, um gangast skal eftir valúrslitunum. Tað var eisini úr hesum valdømum, umboðini, sum møttu á fundinum sunnudagin, vóru.

Seinni verður væntandi farið aðrastaðni eisini til tess at finna ungfólk, sum hava áhuga fyri politikki floksins, og sum vilja átaka sær at standa fyri einum slíkum felag, stendur í tíðindaskrivinum.

Oddafiskar floksins vóru eisini á fundi á Glyvrum sunnudagin, har teir greiddu frá, hvussu var, tá felagið hjá ungum sjálvstýrisflólkið var virkið og hevði sína bestu tíð seinast í áttatiárunum.

Ein trímannanevnd varð vald, sum skal samskipa royndirnar at fáa lív í aftur ungmannafeløgini hjá Sjálvstýrisflokkinum. Í hana komu: Kenneth Rasmussen, Saltangará, sum er formaður. Saman við honum sita í nevndini Frida Christiansen úr Klaksvík, sum er skrivari og Dan Lamhauge úr Havn, sum er kassameistari.

# Flogvøllurin verður tað næsta

**Nú tunlarnir í báðum endum á oynni eru komnir, er flogvøllurin næsta stórmálið, sum loysast skal, sigur vágatingmaður**

ÚTBYGGING
*Edvard Joensen*

**Vágar:** Flogvøllurin er næsta stórmálð, sum loysast skal, sigur Marjus Dam, løgtingsmaður í Vágum.

Undirsjóvartunnilin - fyri ikki at tala um Gásadalstunnilin - hava í nógv ár verið nýtt sum valagn í Vágum, og ikki so fáir løgtingsmenn hava havt inntøku í atkvøðutali við at agitera fyri hesum báðum tunlunum.

Men nú eru teir komnir, báðir tveir, so tað dugir ikki til eitt komandi val.

Men tað eru onnur mál, sum lysast skulu í Vágum, vísir Marjus Dam á.

Og næsta stórmálið, farast má undir, heldur hann, er longjan av flogvøllinum.

– Tað ber ikki til at hava ein flogvøll,sum bara er 1.250 mertrar. Hann má í minsta lagi vera 1.800 metrar, sigur Marjus Dam.

Flogvøllurin í Vágum er ótíðarhóskandi, vísir Marjus Dam á. Sjálvur vøllurin er stuttur, og terminalurin líkur langt frá tey krøv, sett verða til hann.

Men tað er ikki lætt at nútíðargera flogvøllin, tí eingi vil eiga hann, sigur Marjus Dama.

Tað er kortini ikki meira rætt enn so, at føroyinga vilja fegnir yvirtaka flogvøllin, men við teirri treyt, at danir fyrst gera eina útbygging. Og tað vilja danir ikki. Tað er sum at blaka pening út gjøgnum vindeygað, siga teir.

– Tann skerjingin, vit fingu í blokkstuðlinum, ger ta heldur ikki lættari at yvirtaka flogvøllin, sigur Marjus Dam. Hon svaraði í pengum til tða, útbyggingin fer at kosta, sigur hann.

Marjus Dam hevur hug at venda málinum um flogvøllin aftur til veljarafundirnar í Vágum undan seinasta løgtingsvali.